# Tvær gullnálir

Ein tann størsti persónligi heiðurin hjá føroyskum svimjarum er, um svomið verður til eina gullnál. Hesum málinum rukku Kári á Høvdanum og Shaila millum Garðarnar um vikusiftið. Kári svam seg til nálina í 50 metra rygg, og Shaila svam seg til nálina í kappingini á 50 metra firvaldssvimjing.



# Nýtt met til Rigmor

Rigmor N. Arge setti um vikuskiftið nýtt føroyskt met í marathonrenning fyri kvinnur. Metið setti hon í stóru Copenhagen Marathon-kappingini í danska høvuðsstaðnum. Tíðin hjá Rigmor var 3.09.09, og var gamla metið 3.10.39. Samanlagt gjørdist Rigmor nummar 10 í kappingini, har 1.222 kvinnur runnu allar teir 42.195 metrarnar, sum marathon-teinurin er til longdar.

# Svimjioyggin Suðuroy

**FM í svimjing hevur verið um vikuskiftið. Suðuroyar Svimjifelag tók 34 av 42 møguligum gullheiðursmerkjum við sær aftur úr Svimjihøllini í Gundadali, har væleydnaða tiltakið fór fram**

SVIMJING

*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Seinasta føroyska svimjikappingin hetta kappingarárið fór fram um vikuskiftið, tá ið føroyameistararnir skuldu finnast í svimjihøllini í Gundadali, sum var karmur um hetta stórtiltak, sum er ársins hæddarpunkt hjá nógvum ungum og evnaríkum svimjarum. Vikuskiftið bjóðaði 12 nýggj met og nógvar spennandi finalur.

## Eiga hvør sína grein

Suðuroyar Svimjifelag er væl mannað við sterkum svimjarum, og tað vóru eisini tríggir av teirra svimjarum, ið struku avstað við flestu metunum. Hin navnframasti man vera Pál Joensen, og um vikuskiftið setti hann fimm føroysk met. Hesi setti hann í 100m firvald, 100m blandað, 200m blandað, 400m blandað og 200m firvald.



*Pál Joensen gjørdi ikki óvæntað størsta hálið. Um ársskiftið varð hann kosin ársins ítróttanavn í Føroyum, og um vikuskiftið vann hann heiðurin sum ársins svimjari*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Malan V. Bærentsen av Tvøroyri prógvaði so dyggiliga, at hon er sterkasti bringusvimjari í landinum, tá ið hon setti met í 50m bringu, 100m bringu og 200m bringu.

Hetta sama prógvaði Kári J. á Høvdanum úr Fuglafjarðar Svimjifelag í ryggsvimjingini, og svam seg til føroyskt met í 50m rygg, 100m rygg og 200m rygg.

12. og seinasta metið setti sterka kvinnustafettin av Tvøroyri, sum setti met í 4x50m frí við tíðini 1.50:66.

## Kristian aftur í hylin

Veteranurin úr Ægir, Kristian Olsen, hevði um vikuskiftið aftur tikið svimjiklæðini upp á seg. Hann hevur ikki vant regluliga síðan oyggjaleikirnir í fjør, men meteigarin í 50m frí var at síggja á hesum sama teini. Steðgurin tyktist ikki at hava gjørt stóra ávirkan á Kristian, tí hann svam seg á mál áðrenn Pál Joensen, sum annars var spáddur at taka metið hendan dagin. Kristian svam við tíðini 24.61, meðan Pál fekk tíðina 24.67. Gullmerkið vann Pauli Ø. Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag við tíðini 24.12. Metið, sum Kristian harvið framvegis eigur, er 23.97. Hetta setti hann við FM í fjør.

## Pál gjørdist ársins svimjari

Kappingarárið hjá Pál Joensen úr Vági hevur verið framúrskarandi, og hetta fekk hann lønt við heiðrinum 'ársins svimjari 2008'. Tá ið Rás1 hjá Televarpinum tosaði við hann eftir kappingina, hevði hann trupult við at siga, at hetta kom óvart á hann.

- Eg hopaði at blíva valdur til hetta, serliga eftir at eg fyrr í ár eri blivin valdur sum ársins ítróttarbragd, segði Pál Joensen, sum altso á fyrsta sinni er kosin ársins svimjari.

Pál venur sera hart, og hann følir ikki, at hann kann kýta seg enn meira.

- Eg venji tvær ferðir um dagin, og eg kann ikki gera meiri við tað, enn eg geri nú. Eg geri ikki nógv annað, segði Pál.

Stórfingna kappingarár hansara er av her heima á klettunum, men hetta letur dyr upp fyri útlendskum kappingum. Næsti steðgur hansara verður í Serbia, har HM fyri ungdómar verður svomið seinni í ár.

# SvF slapp ikki í part

**Svimjisambandið noktaði SvF atgongd til FM-finalurnar. At enda slapp myndatólið inn, men Sjónvarpið fekk einans samrøðu við formannin í Svimjisambandinum**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum nakað nýtt hevði Svimjisambandið undan ársins útgávu av FM-finalunum valt at gera samstarvsavtalu við Rás1 hjá Televarpinum, sum sendi beinleiðis frá øllum svimjifinalunum um vikuskiftið.

Tann luturin hevur annars ligið hjá Sjónvarpinum, men har høvdu tey hesa ferð valt svimjingina frá. Bæði tí Sjónvarpið í ár hevur sent beinleiðis frá øðrum ítróttatiltøkum, og tí tað eisini er avmarkað, hvussu stór framleiðsluorskan hjá Sjónvarpinum er.

Sjónvarpið ætlaði tó at gera innsløg frá FM-kappingini í svimjing, men tey komu á læstar dyr í Svimjihøllini, váttar Øssur Winthereig, tíðindaleiðari hjá SvF.

- Eg vóni og haldi, at talan fyrst og fremst byggir á eina misskiljing. Okkum stóð aftur í ár í boði at senda frá svimjingini, men vit settu okkum ikki førar fyri hesum. Vit hava annars sent frá øllum FM-finalunum seinastu 10 árini ella so, men í ár valdu vit hetta frá. Ikki minst tí tað er avmarkað, hvussu ofta vit kunnu krevja av okkara fólkum, at tey skulu framleiða beinleiðis sjónvarp um vikuskiftið.

- Vit ætlaðu tó sjálvandi at gera innsløg úr Gundadali, men í fyrstu syftu noktaðu tey í Svimjisambandinum fyri, at okkara fólk skuldu koma inn. Eftir at hava tosað nakað aftur og fram fingu vit tó loyva at koma inn, og vit hava upptøkur frá sjálvari kappingini. Men vit fingu tó ikki loyvi at gera samrøður við svimjararnar, og tað halda vit vera stórt spell, sigur Øssur Winthereig.

# Herd oyggjaleikakrøv

**Svimjisamband Føroya hevur gjørt av at hera um kravtíðirnar til oyggjaleikirnar, soleiðis at tað í framtíðini ikki verður eins lætt hjá svimjarum at kvalifisera seg**

SVIMJING

*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Svimjisamband Føroya kom eftir ein fund leygardagin til ta niðurstøðu, at kravtíðirnar til oyggjaleikirnar skulu herast. Áður hevur kravið verið, at tú skal svimja skjótari enn tann, ið gjørdist nummar fimm á sama teini á undanfarnu oyggjaleikum. Í framtíðini skalt tú svimja skjótari enn tann, ið vann bronsu á sama teini á undanfarnu oyggjaleikum, um tú altso ætlar tær við til leikarnar. Tískil eru tað bara heiðursmerkjakandidatar, ið sleppa við.

Orsøkin til broytingina er tann, at hópurin av tí sama gerst smærri, og at tað eru fleiri svimjarar, ið kappast um gullið. Tað eru nevniliga bara gullmerkini, ið fyrst og fremst telja, tá ið heiðursmerkjabýtið á leikunum fer fram.